**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 28. mars 2017, kl. 19.00**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Laila Haldansen, Eyðun Hansen, Ingi Olsen, John Zachariassen, Herit Magnussen og Øssur Christiansen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Durita á Heygum tann 13. mars 2017 frá, at henni barst frá at møta á fundinum vegna uttanlandsferð. Tiltakslimurin á lista B Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 14. mars 2017, og játtaði at møta.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssuri Christiansen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 16**
Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. mars 2017 umsókn frá felagnum Føroysk Træskip um stuðul til Regatta 2018.
J.nr. 20.15.00-2-17

Umboð fyri felagið Føroysk Træseglskip vóru á fundi við bygdarráðið tann 21. februar 2017, har ið tey greiddu frá um Regatta 2018, sum teir ynskja, skal koma til Vestmanna.
Ætlanin er, at regattaflotin kemur til Vestmanna fríggjakvøld. Skipað verður fyri tiltøkum bæði umborð á bátunum og á bryggjuni. Flotin fer avstaðaftur leygarmorgun.

Nevndin sær jaligt upp á tiltakið og mælir til at samtykkja at seta kr. 25.000 av á fíggjarætlanini fyri 2018 sum stuðul til Regatta 2018. Samtyktin er treytað av, at Regatta 2018 verður sama vikuskifti sum Fjarðastevnan 2018 verður.

**Viðv. 16**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 17**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn frá Bátastevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2017.
J.nr. 20.15.00-3-17

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. mars 2017 umsókn frá Bátastevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2017.

Bátastevnunevndin søkti í skrivi dagf. 19. mars 2017 um kr. 50.000 í stuðli til Bátastevnuna 2017.
Nevndin samtykti at mæla til at stuðla Bátastevnuni 2017 við kr. 50.000.

**Viðv. 17**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.45

Sign.:

Pauli T. Petersen Laila Haldansen Eyðun Hansen

John Zachariassen Ingi Olsen Herit Magnussen Øssur Christiansen